# Reglugerð fyri lýsingar í ítróttarhøllini

§ 1

Mentunarnevndin kann heimila húsavørðunum at geva ítróttarfeløgum og øðrum, sum leiga ítróttarhøllina, loyvi til at seta upp lýsingar í styttri ella longri tíðarskeið, tó ikki longri enn fimm ár um ferðina.

§ 2

Ítróttarfeløg og onnur, sum ynskja at seta upp lýsingar í ítróttarhøllini, skulu søkja um loyvi til hetta í minsta lagi ein mánaða, áðrenn lýsingarnar skulu setast upp.

§ 3

Lýsingarnar skulu setast upp soleiðis, at tær ikki á nakran hátt gera skaða á ítróttarhøllina ella eru til ampa fyri trygdina.

§ 4

Loyvt verður at hava fastar lýsingar, sum standa í upp til fimm ár um ferðina. Loyvt verður eisini at hava leysar lýsingar, sum vera í høllini í sambandi við einstøk tiltøk.

§ 5

Inntøkurnar av føstu lýsingunum fær vetrarítróttin. Inntøkurnar av leysu lýsingunum fáa tey, sum hava tiltøkini, tá tær standa uppi.

§ 6

Tey, sum fáa inntøkuna av lýsingunum, skulu sjálvi seta hesar upp og taka tær niðuraftur. Um lýsarin ikki hevur rindað fyri lýsingina, skulu tey, sum sett hevur hana upp, taka hana niðuraftur og beina hana burtur úr høllini innan tríggjar mánaðar. Um hetta ikki verður gjørt, beina húsavørðarnir lýsingina burtur og rokning verður send teimum, sum sett hava lýsingina upp.

§ 7

Um feløg ella onnur halda seg hava verið fyri órætti í sambandi við býti av inntøkum fyri lýsingar ella annað hesum viðvíkjandi, ber til at venda sær til Mentunarnevndin, sum tekur støðu í málinum.

Henda reglugerð var samtykt á kommunustýrisfundi tann 22. november 2012.

**Vága kommuna**

Albert Ellefsen, borgarstjóri